## VIÐMERKINGAR

# Tey samkyndu – enn einaferð

**Maria Jacobsen**

Eg hevði ikki ætlað mær at leggja uppí hetta orðaskifti um tey samkyndu. At eg so geri tað, er tí eg haldi, at hetta verður so løgið viðgjørt. Tað tykist sum tað snýr seg um, at tað er ein ávís forfylging av nøkrum fólkum, sum eru øðrvísi enn onnur, men tað er jú ikki so.

Samkynd fólk hava altíð verið, tey hava fingið frið, hvør einstakur ger eitt val um hvussu hann livir sítt lív, men tað merkir ikki, at ein slíkur liviháttur er rættur.

Eg minnist, at í mínum uppvøkstri kundi onkur fullur maður detta inn á gólvið og sat og tosaði við pápa mín. Pápi lurtaði fyri tað mesta, men hann var ótrúliga vinarligur og tolin við fulla mannin. Hetta var ikki tí, at hann helt at drykkjuskapur var góður, nei hann brýggjaði seg um mannin, men avgjørt ikki hansara livihátt, og tað er í grundini tað alt hetta snýr seg um.

Vit vita øll at kvinnan varð skapt til mannin, alt annað er burturvið. Samfelagsmynstrið hevur altíð verið: mamma, pápi og børn, jú fleiri vælvirkandi familjur eru, tessbetur virkar samfelagið og jú størri trupulleikar familjur hava, tess størri trupulleikar fær samfelagið. Tað vil siga, at góð foreldur sum ala síni børn væl upp, eru dýrgripir fyir eitt land. Men nú skal hetta kollveltast, nú skal familjumynstrið broytast og menn skulu liva saman við monnum og kvinnur saman við kvinnum, tú skalt heldur ikki váða tær at tala um, at tær ikki dámar hesa lívsførslu, so verður tú lagdur undir at forfylgja ein bólk í samfelagnum. Hvussu nógv fáa tey trúgvandi ikki omanyvir seg fyri at royna at vísa á skeivleikarnar í hesum lívshátti? Í bløðunum nú um dagarnar verða tey skýrd fyri talibanar, fundamentalistar og samanlíknaði við nasistarnar sum jú vóru yvirgangskroppar, tað haldi eg vera grovligt at siga um hampafólk men tá tað snýr seg um tey samkyndu er einki átaluvert, men tað verður beinanvegin rok um onkur vágar sær at siga kynsvillingur. Hvat er sannleikin? Eru hesi fólk ikki vilst av leið? Jú so sanniliga eru tey tað, tað verður sagt at hesi menniskju eru samkynd frá náttúrunnar hond, men tað ivist eg í, um tað altíð er rætt. Eg havi lisið um og hoyrt í sjónvarpinum fólk siga frá hvussu tey eru leidd inn í henda levnaðin og hava ikki verið ment at sleppa burtur úr tí aftur.

Mær tykir, at tað í dag verður lagt nógv eftir teimum mest grundleggjandi sjónarmiðunum í okkara samfelag. Lat tey samkyndu fáa frið, men tey skulu so sanniliga ikki koma við teirra skeivleikum og broyta grundarlagið á okkara siðalæru. Øll vita, at tað er ónáttúrligt at tvey fólk av sama kyni liva saman, vit vita eisini at tað er ein ógvuliga lítil partur sum gera hetta, men hann hoyrist ótrúliga væl í samfelagnum.

Tað stendur skrivað, »at sum mann og kvinnu skapti hann tey« og kvinnan varð skapt til mannin. Tað stendur eisini skrivað um homoseksualitet, bæði í nýggja og gamla testamenti, hvussu nógv ónt tað førdi við sær.

Sexlívið er tað privatasta privata sum fólk hevur, so tað at fólk halda ráðstevnur og ganga kravgongur um slíkt evni, er í sær sjálvum ógvuliga ónáttúrligt. Endamálið er at verða stuðlaði, hvat er tað tey biðja um stuðul til? Er tað at liva saman? Nei, tað gera tey kortini, so endamálið má vera at sleppa at giftast og liva saman sum hjún og tað man fara at ganga illa, at fáa meirluta fyri slíkum í Føroyum. Londini rundanum okkum gera tað verður sagt, men hví skulu vit bera okkum skeivt at, fyri tí um onnur gera tað? Lat heldur okkara land verða eitt fyridømi í, at halda slíkt burtur frá okkara lógarverki, og liva upp til tað vit kalla okkum: Eitt kristið land.

Tað hevur verið skrivað í onkrum lesarabrævi nú um dagarnar, at vit skulu halda bíbliunna burtur, tá ið vit tosa um lógarsmíð og at stýra landinum. Er tað ikki júst eftir boðum Bíbliunnar alt rættarsamfelagið hvílir á? Símun av Skarði sigur í einum av sínum vøkru sálmum soleiðis:

*Tann Gud, sum valdar ævum øllum*
*Og mansins dagar hevur talt,*
*Hin sami, sum á Sinai fjøllum*
*Læt ljóða: »Tú skalt ei, tú skalt!«*

Væl veit eg, at vit í egnari megi ikki megna at liva eitt fullkomið lív, men hava vit mist tað røddina úr okkara brósti, sum ávarandi sigur: Tú skalt ei, tú skalt, so eru vit sanniliga farin av sporinum, bæði land og fólk.

# Oljuavgjald

**Gerhard Lognberg**
*løgtingsmaður*



Oljan er blivin ein marra fyri húsarhaldið. Man kann siga, at ein nýggjur skattur er lagdur á fólkið.

Ein kann altíð tosa um, hvat er skattur og ikki. Men tá ið oljuprísurin er farin so søguliga høgt upp, má okkurt gerast. Í skrivandi løtu síggi eg, at John Jóhannesen kemur inn á tað sama.

Eg vil siga, at eg eri samdur í, at vit skuldu strikað skattalættan fyri at brúkt tann peningin, so fólkið fekk bíligari olju. Við hesi broyting verða øll stuðlað, og skattalættin kemur á eitt turt stað hjá okkara borgarum, bara í øðrum hami.

Men vit hava eina samgongu og eitt samgonguskjal. So her er neyðugt at samgongan kann semjast um hesa broyting. Sum eg skilji, ætlar landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helst at skattalættin verður eftir tí leisti, sum samgonguskjalið sigur.

Í morgin hósdagin, kemur uppskot frá Miðflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum fyri í tinginum um at avtaka oljuavgjaldið.

Teir vísa á í uppskotinum, at 30/3-2000 var lógin um oljuavgjald broytt av undanfarnu samgongu. Hetta var ein feilur, sum undanfarna samgonga gjørdi við hesi lógarbroyting.

Um ikki tað var hent, hevði prísurin regulerað seg sjálvan.

Tað sum eg vil siga er, at samgongan eigur onkursvegna at rætta upp á oljuprísin. Fólkið klárar ikki hesa byrðuna. Hetta at oljan hækkaði so ógvusliga, kom óvart á øll.

Um ikki hetta uppskot frá Miðflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum verður samtykt, so eiga vit í samgonguni at koma við okkara egna uppskoti ongantíð ov skjótt!

# Tað er synd at vera samkyndur

**Eliesar (Essa) Jacobsen**
*Skopun*

Tað ber ikki til at vera samkyndur, og samtíðis vera trúgvandi, tí at skrivað stendur í 3.Mós.18,22: "Tú mást ikki hava samlegu við mann eins og við konu; tað er andstygd."

Tá ið ein prestur ella ein annar, sum stendur fyri eini samkomu, sigur at tað er í lagi at vera samkyndur og standa fram við Guðs orði, tá lýgur hann, tí at skrivað stendur í 3.Mós.20,13: "Hevur maður samlegu við mann á sama hátt sum við konu, tá fremja teir báðir andstygd; teir skulu láta lív; blóðsekt hvílir á teimum."

Hatta er eitt hart vers, men hatta er sannleikin, tí alt sum stendur í Bíbliuni er sannleiki. Tað er tí so fáir tora at siga, at hatta ikki er rætt, og teir sum tora at siga nakað, verða kallaðir fyri eitt og annað. Eg vil rósa teimum, sum tora at standa fram við Guðs orði, og siga at hatta er skeivt.

Tað sama stendur í Rómverjabrævinum. At tað er synd at vera samkyndur, stendur í Róm.1,21-27. Versini 26-27 siga tað beint fram at tað er synd: "Tí gav Guð teir upp í skammloysis girndir; tí at bæði konufólk teirra skiftu hin náttúrliga umgang um við hin ímóti náttúruni. Og á sama hátt løgdu eisini mannfólkini av hin náttúrliga umgang við konufólk og brunnu í fýsni sínum hvør at øðrum, so at mannfólk gjørdu skemdargerð við mannfólk og fingu afturfyri á seg sjálvar tað viðurlag fyri villu sína, sum beint var."

Býirnir Sómoma og Gómorra blivu lagdir í oyði av akkurát sovornari synd, tí at skrivað stendur í 1.Mós.19,4-9, at teir vildu ikki hava døturnar hjá Lot, men menninar. Tað vóru bæði ungir og gamlir menn, sum komu til Lot at biðja um menninar. Trúgva tit ikki hesum, so lesið 1.Mós.19,4-9.

Hvat sigur Jesus til sovorið? Jesus sigur sjálvur í Luk.11,28: "Men hann segði: ja, men sæl eru tey, sum hoyra Guðs orð og VARÐVEITA tað."

Jesus var jødi, tað vil siga, at hann livdi eftir gamla testamenti, og megin parturin av tí, sum eg havi víst til her, er frá gamla testamenti, uttan Róm. 1,21-27. Tá ið tú skalt varðveita Guðs orð, so mást tú eisini taka 1.Mós.19,4-9, 3.Mós.18,22 og 3. Mós. 20,13 við. Tað nyttar einki at taka pettir av Bíbliuni burturúr, sum man dámar sjálvur.

Hvussu kann man varðveita Guðs orð, tá ið man er samkyndur? Tað ber ikki til, tí tað stendur skrivað í 1.Mós.19,4-9, 3.Mós. 18,22, 3.Mós.20,13 og Róm.1,21-27.

Og tað kendasta sum er í Bíbliuni: 1.Mós.1,27: "...sum kall og konu skapaði hann tey", ikki sum kona og kona, ella sum maður og maður, tað er tí samkynd ikki kunnu fáa børn, tí tað er ómóti náttúruni.

Tí er tað ikki rætt at fara í skrásett parlag hjá samkyndum, tí at kirkjan er bygd á Guðs orð. Um kirkjan vígar samkynd, so góðtekur Guð tað ikki, um ein prestur ger tað. Tað er ikki Guð, sum skal taka ímóti ordrum frá okkum, men tað eru vit, sum skulu taka ímóti ordrum frá honum, og teir standa í Bíbliuni.

Tað er tí ikki í ordan at tað eru samkyndir prestar, sum siga seg kenna Guð, men tað er ein kolsvørt lygn. Eg havi verið frelstur í 2 ár, og eg havi longu funnið fleiri skriftstøð, har tað stendur klárt og greitt, at tað er synd at vera samkyndur. Eg havi hoyrt fleiri prestar sagt, at tað er í ordan at vera samkyndur, so eg má spyrja meg sjálvan, hvat teir hava lisið í 7 ár, tá ið teir hava lisið til prest, - tað er so ikki úr Bíbliuni!

Men tað eru ikki allir prestar, sum góðtaka samkynd, og tað eru teir, sum varðveita Guðs orð.

Jesus veri við tykkum.

# Svar til fyrispurning frá Helga Abrahamsen

**Vegna Amnesty International, Føroya Deild**
*Margretha Nónklett, samskipari*

Hóast Føroyar er eitt land, har flestu hava tað gott, samanborið við nógv av heimsins londum, varpaði kjakið í sambandi við ANSO ráðstevnuna ljós á, at tað í Føroyum ikki eru mørk fyri, hvat verður borið fram alment av niðrandi úttalilsum um samkynd. Hetta er ein støða, sum als ikki kann góðtakast. Amnesty heitti tí á myndugleikar og á stjórnarskipanarnevndina um at taka rættindini hjá samkyndum við í komandi stjórnarskipanarlóg, soleiðis at tað verður staðfest, at øll hava krav um rættindi og frælsi, uttan mun til ættarslag, húðarlit, kyn, mál, átrúnað, politiska sannføring ella kynsligan samleika. Amnesty Føroya deild tók málið upp, tí eitt av aðalmálunum hjá felagsskapinum er at stríðast móti øllum mismuni, bæði her á landi og úti í heimi.

Spurningurin um fosturtøku er ikki eitt mál, sum Amnesty International hevur nakra støðu til í løtuni. Amnesty hevur seinasta hálva árið millum annað arbeitt við málinum um støðuna til fosturtøku, seksual upplýsing og fyribyrging. Ásannandi at hetta eru viðkvamir og samansettir spurningar, sum mugu viðgerast nágreiniliga, varð í august 2005 samtykt, at Amnesty á altjóða aðalfundi í 2007 skal taka støðu til spurningarnar, aftan á eina gjølla innanhýsis viðtalu komandi tíðina. Allir limir í Amnesty Føroya deild fáa høvi at skifta orð um hesi málini í heyst og á komandi aðalfundi hjá felagnum. Áhugað kunnu venda sær til skrivstovuna og fáa tilfar um málini.